

*Harold Pinter saman við skaldinum Ernesto Cardenal úr Nicaragua. Myndin er tikin í London í 1987*

sínum viti, síni viljastyrki og síni tungusnild vinnur á Lenny.

## HERFERÐ MÓTI STAKMENNINUM

Tann triði høvuðsleikurin hjá Pinter, *Føðingardagsveitslan,* sum varð frumsýndur í 1958, men ikki fekk viðurkenning fyrr enn nøkur ár seinni, varð umrøddur og ummældur í *Sosialinum* tann 11. juni í ár. Evnið í hesum leiki er indivi-dualisma ella tað, sum Heðin Brú einaferð rópti *at vera sær.* Samstundis lýsir skaldið við hesum bæði eksistentiella og politiska leiki nútíðar yvirgang.

Í sekvensum, sum kunnu fáa blóðið á áskoðaranum at stirðna ella hár hansara rísna sum tindar á einum igulkeri, vísir Pinter okkum í hesum leiki, hvussu eitt menniskja, sum er stakmenni ella konformitetsrýmingur, verð-ur "viðgjørt" av tveimum anda-ligum terroristum. Ávirkanin frá Kafka er týðilig, og eins og Jósef K verður Stanley, eftir tógvið stríð, við undirlutan. So løgið tað kann ljóða er samstundis ikki sørt av komikki í hesum svarta og ræðuliga leiki. Í sínum um-mæli av leikinum tók kritikarin Harold Hobson soleiðis til í *Sunday Times:*

*Okkurt er í tíni fortíð - sama ger hvat - sum fer at fáa teg aftur. Hóast tú rýmir út í heimsins fjarastu avkrókar og krógvar teg í tí ókendasta høli í tí mest burturgloymda býi, so er ein dagin møguleiki fyri, at tveir menn fara at koma. Teir fara at leita eftir tær, og tú sleppir ikki burtur. Og onkur fer eisini at leita eftir teimum. Ræðsla er allastaðni.*

## PINTER OG USA

Tá ið hjúnalagið hjá Harold Pinter í 1975 syndraðist, og hann kastaði saman við rithøvundinum Antoniu Fraser (sum hann seinni giftist við), tók eisini eitt nýtt kapittul við í hansara tilveru sum skapandi listamaður. Antonia Fraser er søgufrøðingur og hevur skrivað ein hóp av drúgvum dygdarverkum um m.a. Mariu Stewart, Cromwell, Karl II og Mariu Antoinette. Við tað at hon, sum vitiligt er, eisini hevur politiskt forvitni, var hon við til at menna tann politiska áhuga, sum síðani hevur sett sín dám á greinskrivaran Pinter og á partar av hansara ritverki.

Pinter hevur serstakliga lagt seg eftir at tala og skriva ímóti píning, og hann hevur gjøgnum felagsskapin PEN virkað fyri at fáa m.a. fongslaðar rithøvundar í totaliterum londum, eitt nú í Afrika, latnar leysar. Hann hevur, kanska serliga í leikinum *One For The Road,* lýst, hvussu eitt blóðugt, eirindaleyst einaræði kúgar, pínir og eyðmýkir tann einstaka, í hesum føri ein lítlan drong og foreldur hansara.

Hóast Pinter í hesum leiki eins væl kann sipa til Ceausescu sum til Pinochet, hevur hann serliga lagt seg eftir at avdúka tann yvirgang, sum USA, beinleiðis ella óbeinleiðis, fremur í heim-inum. Eitt nú er eingin ivi um, at leikurin *Mountain Language* sipar til tann blóðuga yvirgangin, sum Turkaland, stuðlað av USA, framdi móti kurdum, og serliga viðger royndirnar at beina fyri tí kurdiska málinum. Tað tænir Pinteri til heiður, at hann, sum umboð fyri nettupp tað hættisliga og oyðandi ensk-amerikanska málumráðið, tekur evnið *mál-morð* upp í einum av leikum sínum.

Sjálvur taki eg ikki undir við tí, sum tað tykist, at kalla treyta-leysu pasifismu, sum Pinter tykist at umboða. Sum m.a. svenski rithøvundurin Knut Ahnlund hevur víst á, tykist heldur ikki alt, sum Pinter ger ella sigur, klókt ella væl um-hugsað. Hetta hevur havt við sær, at røddir m.a. á høgravonginum í hesum tíðum ikki bara mótmæla avgerðini hjá nobelnevndini í Stockholm, men eisini seta spurnartekin við Pinter sum skald.

## TOTALITARISMA Í HAMFERÐ

Fyri okkum, sum minnast veður-lagið í heiminum fyri einum mansaldri síðani, upplivist hetta sum totaliter hugsan í hamferð. Líkasum Sovjetsamveldið tá, fyri mongum andsmennum, stóð sum ein lýtaleys glæstrimynd, hevur USA í dag fyri mongum eyg-leiðarum og fjølmiðlafólkum imperiala tign. Og líkasum tann politiski veruleikin tá aldi eitt ættarlið av ósjálvstøðugum elti-bløðrum, hevur USA-imperiið skapt eitt nýtt ættarlið av muum og pápugoyum, sum býttliga og spurningsleyst bara endurtaka tann tóma retorikkin hjá eitt nú tí amerikanska nýafturhaldinum.

Listin er fræls og stendur yvir tilvildarligum og altíð ófull-komnum politiskum valdi. Men okkara nýggju krossfararar vilja aftur binda listina niður, enda-venda tignarstiganum og gera hana til træl hjá tí ráðandi politisku hugmyndafrøðini.

At Pinter hugsar sjálvstøðugt og m.a. loyvir sær at tala keisaranum ímóti, tola nútíðar høvuðleysu USA-fjepparar ikki. Tann danski blaðmaðurin Martin Krasnik er enntá so óskettin at nevna (í *Weekendavisen* 14.-20. okt.), at trúarfelagar Pinters kanska hava brúk fyri sálarvið-gerð. Ein minnist í hesum við-fangi tíðina, tá ið sovjetskir frá-víkjarar vóru tvingsilsviðgjørdir á sinnissjúkrahúsum ella, sum Andrej Sakharov (ein annar nobelvinnari), skýrdir svakir. Er tað kanska tann vegin, vit ætla okkum?

*Vinur er hann, ið vomm sær,* plagdu føringar at siga. Hugtakið antiamerikanisma tykist, sum tað mangan verður brúkt í dag, líka so býttligt og infantilt, sum hugtakið antisovjetisma tóktist fyri fjøruti árum síðani. Teir sonnu USA-vinirnir eru kanska í roynd og veru andsmenn sum Pinter og Chomsky, Chalmers Johnson ella tann gamli vísi John Kenneth Galbraith.

## LE FRISSON NOIR

Men latið okkum til seinast venda aftur til avrikið hjá Harold Pinter. Tá ið franska skaldið Charles Baudelaire hevði yrkt yrkingina "Teir sjey gomlu menninir" (Les sept vieillards), sendi hann tekstin til vinmann sín Victor Hugo, sum skrivaði aftur: "Tú hevur skapt ein nýggj-an skjálvta" ("frisson nouveau").

Harold Pinter hevur skapt ein nýggjan skjálvta í enskum bók-mentum, av serligum myrkum slag. Sum sjónleikahøvundur er hann ikki epikari, men heldur ein lýrikari, hvørs døkka og sam-stundis skemtfermda univers í hansara høvuðsleikum í fyrstuni er einraddað og greitt, men við tíðini verður alt meira polyfont, allegoriskt og torskilt. Dømi um hetta seinasta er leikurin *No Man´s Land,* sum tykist vera ein meditatión yvir aldurdómsins nærkan, við tilsipingum til Eliot og Virgil, har høvuðspersónurin, rithøvundurin Hirst, í einum limbo millum rørslu og stirðnan, lív og deyða at enda er við undirlutan og verður førdur inn í

*Ongamannaland. Sum aldri vikast, sum aldri broytist, sum aldri verður eldri, men sum verður verandi um ævir, eitt ísland, tigandi.*

Tað, sum fær áskoðaran at for-vitnast ella ógvast við ella ræðast ella læa, tá hann sær leikirnar hjá Pinter, er ikki bara teirra tematikkur, men kanska meira - sum hetta brotið vísir - teirra formur: tað kvettuta, bonska, ónæriliga, hóttandi, angistarfylta og poetiska - og samstundis altíð neyva og musikalska - replikk-kynstrið.

Veri hesi fáu og ófullkomnu orð ein kvøða til riddaran á tí gangara, ein hóskandi kundi rópt *le théâtre noir.* Hjartaliga til-lukku.



*Harold Pinter og Antonia Fraser á teirra brúdleypsdegi í 1980*